# Skulu venda skeivu gongdini

**VODAFONEDEILDIN** Hvørki B36 ella Víkingur hava vind í seglunum í løtuni. Síðst liðini vunnu var í triðja umfari, og tí skulu bæði liðini venda skeivu gongdini, og tað gerst bert við at vinna

Óalvur Øre Hansen



*Johan Ellingsgaard*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Eftir eina flúgvandi byrjan við trimum sigrum eftir trý umfør, hevur B36 bert fingið trý stig í seinastu trimum dystunum. Hóast stígur er komin í hjá B36, so liggur B36 á øðrum plássi eftir seks dystir, og tað er ikki so galið. Men tað er eingin loyna at B36 skal til at vinna dystir aftur, og Kristi Himmalsferðardag er møguleiki fyri tí, tá Víkingur kemur á vitjan í Gundadali.

Ártalsfelagið úr høvuðstaðnum hevur havt nakrar skaðar at dragast við. Sigfríður Clementsen sigur í samrøðu við Sosialin at Dimitrije Jankovic verður tøkur, meðan Herbert í

## Hóast støðan ikki er so galin, so er eingin loyna at B36 skal til at vinna aftur

Lon Jacobsen ikki verður við í dystinum móti Víkingi.

Støðan hjá Víkingi er meinlík støðuni hjá ártalsfelagnum. Felagsliðið úr Gøtu og Leirvík hevur ikki vunnið síðani teir í triðja umfari vunnu 0-2 á NSÍ, og dysturin móti B71 sunnudagin, gav ikki ábendingar um eitt Víkinga lið við sjálvsáliti.

Tískil er lagt upp til eina spennandi uppgerð millum B36 og Víking í Gundadali, har tað ræður um hjá báðum liðum at vinna. So er spurningurin bara hvørt tað verður ártalsfelagið ella felagsliðið, sum megnar at draga longra stráið, ella at liðini leggja fót fyri hvørt annað við at leika javnt.

post@sosialurin.fo

## Føroyska Vodafonedeildin

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 6 | 4 | 2 | 0 | 13 | 9 | +4 | 14 |
| 2 | B36 | 6 | 3 | 3 | 0 | 12 | 6 | +6 | 12 |
| 3 | B68 | 6 | 3 | 0 | 3 | 16 | 13 | +3 | 9 |
| 4 | Víkingur | 6 | 2 | 3 | 1 | 12 | 10 | +2 | 9 |
| 5 | ÍF | 6 | 2 | 3 | 1 | 7 | 5 | +2 | 9 |
| 6 | NSÍ | 6 | 2 | 1 | 3 | 8 | 8 | 0 | 7 |
| 7 | FC Suðuroy | 6 | 1 | 3 | 2 | 10 | 12 | -2 | 6 |
| 8 | B71 | 6 | 1 | 3 | 2 | 7 | 13 | -6 | 6 |
| 9 | EB/Streymur | 6 | 1 | 2 | 3 | 7 | 8 | -1 | 5 |
| 10 | AB | 6 | 0 | 2 | 4 | 9 | 17 | -8 | 2 |

**Vodafonedeildin, 7. umfar**

| | | |
|---|---|---|
| 12. mai | B68 - NSÍ | Eiler Rasmusen |
| 13. mai | B71-HB | Petur Reinert |
| | ÍF-FCSuðuroy | Dagfinn Olsen |
| | EB/Streymur-AB | Páll Augustinisen |
| | B36-Víkingur | Rúni Gaardbo |



**TOPPSKJÚTTIN**
*Landsliðsleikarin, Christian Høgni Jacobsen, er formsterkasti áleyparin í Vodafonedeildini. Og uttan iva er sjálvsálitið hjá honum og liðfeløgunum í topp undan grannauppgerðini á Toftum*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

# Klárar B68 at steðga Christian Høgna?

**VODAFONEDEILDIN** Chrisian Høgni Jacobsen er uttan iva formsterkasti leikarin í Vodafonedeildini í løtuni, har hann eisini eru toppskjútti. Tískil er umráðandi hjá B68 at steðga talismaninum hjá runavíkingum, um teir skulu vinna grannauppgerðina, sum verður á Svangaskarði í kvøld

Ólavur Øre Hansen

Christian Høgni Jacobsen hevur skorað seks mál í seks dystum, samstundis sum NSÍ bert hevur skorað átta mál higartil í kappingini. Tað ber boð um ein leikara við sera stórum týdningi fyri sítt lið.

Eftir eina ringa byrjan uppá kappingina, so hevur tað gingið væl betur hjá NSÍ seinastu dystirnar. Fyri góðari viku síðani vunnu teir greiðan sigur á AB, og fríggjadagin vórðu sundalagsmenn sendir norð aftur við einum 2-1 tapi í skjáttuni.

Í áður nevndu dystunum hevði Christian Høgni ein leiðandi leiklut. Talismanurin hjá runavíkingum var, saman við eini kompaktari verju, drívmegin aftanfyri sigrarnar, og spurningurin er bara um teir klára at halda jaligu gongdini í grannauppgerðini á Svangaskarði.

Hjá NSÍ hava nakrir leikarar havt smáskaðar at dragast við, men væntandi eru allir tøkir til dystin á Svangaskarði. Tískil hevur Pauli Poulsen, venjari hjá NSÍ møguleika at byrja við somu uppstilling, sum í dystunum móti AB og EB/Streymi.

Meðan formkurvan hjá runavíkingur er jalig, so er ørvísi við B68. Toftamenn hava havt eitt rímiligt kappingarár higartil, men úrslitini bera boð um eitt lið, ið ikki heilt hevur funnið stabilitetin enn. Toftamenn hava vunnið tríggjar heimadystir, og tapt tríggjar útidystir. Somuleiðis virkar javnvágin millum verju og álop ikki heilt. B68 hevur skorað mest mál í kappingini higartil, meðan toftamenn hava latið næstflest mál inn.

Meðan runavíkingar kunnu stilla upp við sterjastu manning, so meira óvist við B68. Sambart venjaranum hjá toftamonnum er ikki avgjørt um Ahmed Keita verður við, meðan N'Dende eftir øllum at døma verður aftur at síggja á miðvøllinum hjá B68.

Grannadystirnir millum B68 og NSÍ plaga at vera spennandi og intensir dystir, har bæði liðini vilja gera alt fyri at vinna. Spurningurin er bara um B68 klárar at steðga runavíkingum, við einum vælleikandi Christian Høgna Jacobsen á odda.

## Meðan formkurvan hjá runavíkingur er jalig, so er ørvísi við B68

post@sosialurin.fo